# Vestmenningar flota aftur

**Árliga bátastevnan hjá Vestmenningum, Kjalarvatn, verður aftur í ár hildin seinast í mei. Og tiltøkini verða ikki færri, enn tey plaga at vera**

BÁTASTEVNA

*Edvard Joensen*



*Undirtøkan á bátastevnuni í Vestmanna plagar at vera góð*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vælkenda bátastevnan, Kjalarvatn, sum vestmenningar á hvørjum ári skipa fyri, verður í ár hildin tann 21. mei, sigur róðrarnevndin hjá VÍF í tíðindaskrivi.

Sum vanligt fara bátarnir at møtast fyri Fútakletti, haðani farið verður sum í grindarakstri inn á Vestmanna. Siður hevur verið árini frammanundan, at gamli postbáturin Ólavur líkasum hevur verið formansbátur.

Á havnarlagnum í Vestmanna verður tann vanligi veitslurómurin, tá alt fylgið leggur at. Har verður heit súpan við onkrum afturvið at fáa hjá teimum, sum koma siglandi á Vestmanna. Tónleikur verður at hoyra frá bæði harmonikum og hornorkestri. Og so verður tað sum á øðrum stevnum, at bæði sølubásar og stuttleikabásar við ymiskum undirhaldi til bæði børn og vaksin vera á bryggjuni. Í ítróttarhøllini verður eisini skipað fyri ymiskum undirhaldi sum minitivoli, andlitsmáling og fleiri slíkum tiltøkum.

Matsøla verður eisini, so ongum nýtist at ganga svangur í Vestmanna. Men tað plaga fólk heldur ikki at gera á hesi stevnuni. Tí allastaðni liggja bátar, har blítt fólk er umborð, og dúgliga verður vitjað ímillum. Og tað plagar ikki at vera keðiligt.

Um kvøldið verður skipað fyri dansi í ítróttarhøllini, har Country Bólkurin í Klaksvík fer at spæla. Skipað verður eisini fyri bussambandi millum bygdir, siga fyrireikararnir.

Kappróðrarnevndin hjá VÍF sigur at enda í tíðindaskrivinum, at meira nágreiniliga skrá kemur umleið eina viku fyri tiltakið.

# Sáttmáli um vaktarhald

**Landsverk og Vága Vaktarhald hava gjørt sáttmála um vaktarhaldið við langtíðarperkeringini við flogvøllin**

VAKTARHALD

Vága Vaktarhald fer framhaldandi at hava eftirlit við langtíðarparkeringini við flogvøllin. Tað varð greitt, tá Vága Vaktarhald og Landsverk, sum hevur ábyrgdina av økinum, skrivaðu undir ein tvey ára sáttmála í seinastu viku, skrivar heimasíðan hjá Landsverki.

Vága Vaktarhald hevur í eina tíð royndt eina fyribilsskipan við vaktarhaldi fyri Landsverk. Í december í fjør varð skipanin boðin út, og Vága Vaktrarhald hevur nú fingið fastan sáttmála við Landsverk um komandi tvey árini at hava efirlit við teimum bilum, sum fólk seta frá sær við flogvøllin, meðan tey eru uttanlands.

Vága Vaktarhald hevur ætlanir um at betra um tænastuna, soleiðis at fólk umvegis eina heimasíðu, sum er í gerð, kunnu fáa at vita, hvussu til stendur við parkeringsmøguleikum, prísum og tilboðum. Eisini er ætlanin at seta eitt vevmyndatól upp, soleiðis at til ber at síggja parkeringsplássið og á tann hátt gera sær meting av, um tað nú loysir seg at fara heiman í frá við bili og fá hann ansaðan, meðan ein sjálvur er burtur.

**ej**



*Langtíðarparkeringin við flogvøllin fer nú at koma í fasta legu. Stutttíðarparkeringin veðru kortini tann sama sum higartil*

# Vilja selja Vágar



*Heilt nógv fólk hava koyrt fram við Gróthústanga í Vágum, men bara ein evarska lítil partur av teimum er farin úr bilinum og hevur gingið fram við Vatninum. Tann túrurin er bert ein av nógvum spennandi gongurtúrum, sum gerast kunnu í Vágum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Nú skulu vágar seljast. Tað hevur Felagið Vágar sett sær fyri. Komandi tveir leygardagarnar verða tiltøk, sum ætlandi skulu menn sølu- og tænastuvinnu í oynni**

TÆNASTA

*Edvard Joensen*

**Vágar:** Vágafólk fara komandi tveir leygardagarnar at halda skeið fyri teimum, sum vilja vita meira um sølu- og tænastuvinnu í oynni.

Felagið Vágar fer komandi leygardag at skipa fyri skeiði um sølu og tænastu. Tað sum tey nevnda Sølugerðin ella visuel søla.

Skeiðið verður hildið í Bø og byrjar leygarmorgunin klokkan 09.00 og heldur á til klokkan 18.00 leygarkvøldið.

Tað er Benny Eidesgard frá felagnum Samskifti, sum fer at halda skeiðið fyri fólki, sum hevur teknað seg. Tekningarfreistin er farin, siga fyrireikararnir.

Trivið verður í mangt og hvat, sum hevur við sølu og tænastu at gera. Heilt frá grundini av.

Hvør kann fara undir slíka vinnu? Hvussu fólk eiga at bera seg at í slíkari vinnu? Um at taka í móti fólki. Tosingarlag, verumáti og hvat nú kann renna í hugan.

Leygardagin 26. mars, sum er páskaaftan, verður ein temadagur um ferðavinnu í Vágum hildin í bygdarskúlanum í Miðvági. Hesin dagur er partur av skránni hjá Kvinnubólkinum í Vágum.

Á tí tiltakinum fer millum onnur Oda Andreasen, sum er produktchefur hjá stóra ferjufelagnum Stena Line, at siga frá um ferðavinnu og ymsar hættir at reka ferðavinnu.

Eisini verður pláss fyri meira lokalum hugleiðingum, har millum onnur Ólavur Poulsen úr Vatnsoyrum fer at siga frá.

Hesin temadagurin um ferðavinnu í Vágum, byrjar klokkan 14.00 seinnapartin, og hann er almennur.